VALGREINAR

## Vinnulívið í fremstu røð

**Absalon Matras,**
*valevni Sambandsfloksins*



Í grein 3 í stevnuskrá Sambandsfloksins stendur m.a., at flokkurin arbeiðir fyri, at einhvør vinna sum hevur gróðrarlíkindi her á landi, fær best møguligar umstøður at virka undir.

Um vit skulu hava framburð og trivna her á landi, fyri ikki at tala um størri sjálvstýri, so er tað alneyðugt, at allar góðar kreftir virka fyri, at vit fáa eitt fjølbroytt og sterkt vinnulív. Her vil Sambandsflokkurin leggja alla orku í at skapa so góðar karmar sum gjørligt, til frama fyri øll, sum virka í vinnulívinum.

**Leirvíksfjørður**
Tað hevur sera stóran týdning fyri vinnulívið, at ferðasambandið er gott. Nógv hevur verið skrivað og tosað um sambandið um Leirvíksfjørð, sum als ikki hevur verið nøktandi seinastu árini. Fiskaflutningur og annar flutningur verður seinkaður í tímar, og heldur ikki kann bjóðast ferðandi, at skula vassa í evju úr treilarum og lastvognum umborð á Dúgvuni.

Trupuleikin verður sjálvsagt loystur, tá ið undirsjóastunnilin er komin, men vinnulívið kann ikki bíða, og tí má ein loysn finnast sum skjótast.

**Kalsoyarfjørður.**
Ein onnur farleið er siglingin um Kallsoyarfjørð. Nú eru mong ár síðan, at vegasamband varð gjørt til allar bygdir í oynni, og var hetta eitt stórt framstig. Men ein undrast á, at enn er eingin ferjulega komin, og ferðasambandið er út av lagi vánaligt. Møguleikarnir hjá vinnulívinum og trivnaðurin hjá fólkinum í Kallsoynni átti at verði nógv betri.

Eg hoyri, at Barskor nú skal skifta motor. Allur bæti bøtir, men eg haldi, at fólkið í Kallsoynni hevur annað uppiborið. Neyðugt er við einum betri og størri skipi til hesa farleiðina. Tað hevði kanska verið vert at roynt, um Sam varð nýtiligur til hesa sigling, sum ein fyribil loysn, til ferjulegan er gjørd og ein hóskandi ferja fingin til vega. Sam kundi, um so var, eisini hjálpt Dúgvuni við flutninginum um Leirvíksfjørð.

**Tunnlarnir**
Eisini vil eg nevna tunnlarnar millum Klaksvík og Hvannasund. Teir eru als ikki tíðarhóskandi longur. Tá ein sjálvur er bussførari, so veit ein, hvussu trupult tað er at koyra ígjøgnum. Tað eru bert fáir cm. til takið kemur uppundir, og teir størstu bussarnir sleppa als ikki ígjøgnum. Hetta er til ampa fyri ferðavinnuna og aðrar vinnur norðanfyri.

**Tað kostar**
At gera karmarnar hjá vinnulívinum so góðar sum gjørligt, kostar væl av peningi í fyrstu atløðu, men sum frá líður fáa vit henda pening aftur í ríkiligt mát.

Loysingaflokkarnir kunnu ikki gera nógv við hesi viðurskifti í komandi árum. Hjá teimum er tað niðurlaðingin av blokkinum, sum liggur fremst í huga. Teir gera tingini í øvugtari raðfylgju, og hetta førir við sær, at peningur fer at resta í allar staðir í samfelagnum.

Sambandsflokkurin raðfestir vinnulívið í fremstu røð og fer at syrgja fyri, at einhvør vinna, sum hevur gróðrarlíkindi her á landi, fær best møguligar umstøður at virka undir.

## Nú skal pensjónsmálið loysast

**Hendrik Thomsen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Fráfarandi samgonga hevði sett sær fyri at koma við einari nýggari eftirlønarskipan, sum skuldi vera ein persónlig uppsparing. Teir gjørdu fleiri royndir, men komu ikki á mál. Semja var sum vera man heldur ikki millum samgonguflokkarnar um, hvussu hetta skuldi fremjast. Fakfeløg og fólk flest tóku heldur ikki undir við hesum uppskotum.

Men nú Javnaðarflokkurin væntandi kemur í samgongu eftir valið, skal hetta málið loysast. Fólkapensjónin skal økjast bæði við at hækka upphæddina og við at prístalsregulera allar pensjónir. Samhaldsfasti eftirlønargrunnurin skal styrkjast, bæði við at stovnsfæ grunnsins verður munandi økt, og við at inngjaldið frá arbeiðsgevarum og løntakarum verður økt úr 1/2 upp í 2%. Ein slík øking skal mótvigast við samsvarandi lækking í skattinum.

Við fólkapensjónini og samhaldsfasta skulu stakir pensjonistar koma upp á 10.000 kr og pensjonistahjún upp á 16.000 kr. um mánaðin. Hesar upphæddir verða øktar við árligari rentutilskriving úr Samhaldsfasta.

Tey fakfeløgini, sum vegna limirnar samráðast við arbeiðsgevararnar um eftirlønarrættindi teirra, og hvørs inngjøld fara til P/F Føroya Lívstrygging, skulu fáa ávirkan á hetta felag í einum tíðarskeiði, meðan arbeitt verður við málinum um, hvussu ognarætturin til felagið verður staðfestur á ein hátt, har tann, ið rindar og eigur virðið í felagnum fær sína náttúrliga ávirkan og avgerðarrætt.

Hetta verður eitt av greiðu málum Javnarfloksins at krevja í einum komandi samgonguskjali til tingingarnar eftir valið.

Samstundis skal við nýggjari lóg um eftirlønargrunnar gerast møguligt hjá øllum løntakarafeløgum at skipa egnar eftirlønaruppsparingar fyri limirnar, so sum orka og vilji teirra er. Hetta kann best fremjast við at fólk, ið hava áhuga fyri hesum málum, fáa beinleiðis ávirkan á komandi løgting.

Tí er ein atkvøða til eitt av javnaðarumboðunum besta trygd fyri virðilig ellisár og ein landsbúðskap, ið hvílur á nógvum herðum í náttúrligari javnvág og nøgdsemi millum manna.

## Frælsisvarp Føroya, góðan dag

**Súsanna Dam**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Her eri eg aftur við nøkrum vælvaldum og heilt ópartískum tíðindum:

*Tíðindi:*
Danskarar ganga so lítið í kirkju, at bispurin XXY heldur, at teir skjótt mugu stongja eini 70 kirkjur.

Uttanlandsskuldin hjá Danmark er hækkað nógvar milliardir seinastu árini.

Íslendski professarin YXX er so góður við okkum, at hann bæði hevur hildið skeið í fólkateljing og givið okkum íslendskar manntalslistar at grannska, so at vit kunnu menna okkum eins og Ísland.

Høgni hevur sagt, at ongantíð áður er so nógvur peningur brúktur til ellis- og røktarheim, sum hetta valskeiðið. Høgni sigur eisini, at tann, ið ikki er samdur, er ósamdur.

*Veðurtíðindi:*
Stormur og kavarok av landsynningi, sum um nakað annað var vætandi haðani.

*Ítróttartíðindi:*
Høgna'sa fólk vunnu stórsigur, mótstøðuliðið fekk ikki meira enn 3/4 av málunum.

Næsta sending eitur: Hvat Høgni heldur, at øll eiga at vera samd um. Aftaná senda vit so:

Øll eru samd við Høgna. Endað verður við sendingini: Høgni greiðir frá, at øll eru samd, summi vita bara ikki av tí.

*Sjeyarin:*
verður um hví Høgni hevur rætt, Høgni svarar spurningum og allir lurtarar, sum halda sum hann, er vælkomnir at ringja og luttaka í felagskórinum.

Hetta var alt í dag, farvæl og havið tað nú so gott.

## Sjónvarpsgjaldið – avtakið lógina nú!!!

**Finnleif Guttesen**
*Valevni Sambandsfloksins, Tvøroyri*



Tú skalt bert gjalda 1500 krónur, um tú hevur hug til at síggja sendingarnar frá SVF

Tey, sum fegin vilja síggja tað, sum SVF sendur, skulu kunna keypa eitt kort og kassa frá SVF fyri tær 1500 krónurnar sum SVF-gjaldið er. Harvið fáa tey møguleikan at hyggja eftir øllum tí, sum SVF sendur.

Tey, sum ikki hava hug at hyggja eftir sendingunum, sum SVF sendir, kunnu lata verða við at keypa kort og kassa frá SVF fyri 1500 krónur.

Við hesum uppskoti og við at avtaka lógina um SVF gjald, verður tað sjálvboði um tú vilt gjalda sjónvarpsgjald ella ikki.

Kann tað verða einfaldari?

## Hvussu fara allir pengarnir til almanna- og heilsumál

**Leila Hjørleivsdóttir á Lofti,**
*valevni Fólkafloksins*



Við samskipan, tvørfakligum samarbeiði og nýtslu av verandi hølum ber til at nøkta viðgerðartørvin hjá rørslutarnaðum fyri rímiligan kostnað.

Hevði tvey hjartamál til valið '98. Annað, Barnsburðargrunnurin, er veruleiki í dag. Men hitt,at nøktað viðgerðartørvin hjá teimum rørslutarnaðu, er onga leið komið.

Og tó hevur Tórshavnar kommuna hevur sett skjøtil á við Tjarnargarði.

Hesuferð kom viðgerðartørvurin við í valskránna hjá fólkaflokkinum (s.25). Koma vit í samgongu eftir valið, skal mín ávirkan ikki liggja eftir fyri at fáa tað í samgonguskjalið.

Ì mínum arbeiði í Føroyum síðani 1988 síggjast dagliga prógv fyri, at talan er um stóran trupulleika bæði hjá vaksnum rørslutarnaðum og børnum (eisini hvussu trupult tað er hjá teimum, sum brúka koyristól, at koma til mítt arbeiðspláss ).

Tað eru longu fleiri ár síðan, eg fyrstu ferð í SvF vísti á tørvin á rehabiliteringseindum. Foreldur stríðast, men hvat nyttar tað, tá tey onga lóg hava í hondini at vísa á?

Tað er meiri enn harmiligt, at fólk noyðast av landinum at fáa venjingar, vit lætt kundu gjørt her.

Fólkatingið samtykti í fjør tvær nýggjar lógir um "genoptræning", sum áleggja amtum og kommunum at fáa í gongd nøktandi, samskipaða rehabilitering.

Sum fylgja av hesum lógum fara í heyst MASTER-útbúgvingar í gongd innan rehabilitering. Vit eru komin til steinsetingina: Fyrireika lógir, lagaðar til føroysk viðurskifti.

Eg havi hildið uppá, at uppvenjinarøkið ikki nýtist at vera dýrt.Vit hava sjúkrahús, ítróttarhallir, hølir á røktarheimum, klinikkir og heilsumiðstøðir runt um í landinum, so neyvan er tørvur á stórum íløgum.

Fíggjarlógin í ár verður brutto uml. 3,4 mia kr. Almannaverkið kostar 1,2 og heilsuverkið 0,5 mia kr, tils. útivið helvt av allari fíggjarlógini.

Hesa 1.600 mio kr skulu so tey 16000 føroysku húsarhaldini gjalda.

Í meðal rindar sostatt hvørt húsarhald í ár 70.000 kr til almannaverkið og 30.000 til heilsuverkið(íalt 100.000 kr pr húski í meðal til hesi endamál).

Kortini klaga fólk um, at tey fáa ikki nyttu fyri allan henda pening.

Samskipan og tvørfakligt samstarv eru lyklaorðini, um meira skal fáast burtur úr hvørjari krónu, vit gjalda.

Tað gongur eisini sum ein reyður tráður gjøgnum álitini um sernámsfrøði og stuðulsskipanina.

Okkum vantar ein yvirorðnaðan heilsupolitikk, sum má orðast í næstu tingsetu.

Hvat nyttar tað, at vit brúka nógvan pening fyri at fáa eitt menniskja at yvirliva, og síðan, at vit ikki lata tað liva at virðiligt lív ?

Siga vit A, mugu vit eisini siga B.

Tað vil Fólkaflokkurin gera.

## Ellis og Røktarheim

**Marjus Dam,**
*løgtingsmaður Sambandsfloksins*



Tað er sera harmiligt at síggja, at Fólkaflokkurin nú, eftir at hava bygt 0 (les: onki) røktarheimspláss seinastu 4 árini, nú í valkampinum er fari at byggja sera óført. Men tað skal vera bíligt, verður lagt afturat. Um viljin til at byggja hesi pláss verður líka stórur komandi 4 árini sum seinastu 4 árini, so er ikki nógv at bíða eftir.

Sambandsflokkurin vil byggja ellis og røktarheimspláss, ið eru egnaði til tey eldru. Ídag vita vit, at mong sambýlir eru góð, tá fólk eru væl fyri, men tey eru ikki egnaði til endamálið, tá fólk gerast røktarsjúklingar. Og júst tað er trupulleikin hjá mongum sambýli ídag.

Eisini vita vit, at mong av teimum eldru mugu hava møguleikan at gera eitthvørt ítriv, ímeðan tey eru á einum slíkum heimi. Júst møguleikin fyri hesum ítrivum er á teimum "dýru" ellisheimunum, ið Fólkaflokkurin ikki vil hava, tí tey kosta ov nógv. Vit kundu útbygt og hækka normeringina til júst ítrivið, so eldri fólk úttanífra eisini fingu møguleika at koma til heimini um dagin. Vit hava bæði nógvar og stórar møguleikar.

Tað er neyðugt at hava í huga, at eitt ellis og røktarheim hevur kvalitet at bjóða teimum, ið búgva á heimunum. Tí annars verður ikki livandi, hvørki hjá teimum í skulu búgva har, ella teimum í skulu arbeiða har.

Latið okkum fáa góð ellis og røktarheim - eisini um tey eru dýr.

Tað skuldi Fólkaflokkurin hugsa um, áðrenn ríkisveitingin, í villum loysingarrúsi, var skerd.

Loysingin hevur oyðilagt nógv í hesum landi.

Um núsitandi samgonga hevði havt gjørt tað, hon var vald at gera, so høvdu fleiri elli og røktarheim sæð dagsins ljós seinastu 4 árini. Men alt fólkið varð gloymt orsaka av loysingini. Og eftir onki at hava gjørt - so skulu teir nú byggja - bíligt.
Um teir sleppa framat aftur, so eri eg bangin fyri, at teir aftur fara at at loysa - og kostnaðurin fyri ellis og røktarheimsbygging komandi 4 árini verður aftur sera bílig - nevniliga 0,00 kr fyri 0 (onki) pláss.

Tað má ikki henda.

Tí X fyri Sambandsflokkinum

## Landshúsarhaldið grundast á føroyska framleiðslu

**Sólja Fríða Jóanisdóttir,**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymi*



Andstøðuflokkanir koyra ræðuherferð um, at føroyski búskapurin er yvirupphitaður, og at hall verður á fíggjarlógini fyri 2002.

Grundsjónarmið Fólkafloksins er, at landshúsarhaldið skal grundast á føroyska framleiðslu.

Virðini, ið verða framleidd í landinum eru grundstøðið undir landshúsarhaldinum. Tí er tað at so stórur munur er á sambandsflokkunum (Sambands- og Javnaðarflokkinum) og á Fólkaflokkinum.

Vit meina, at tað ber til at húsast við tí, ið vit sjálvi virka her á landi og vit vilja, at landshúsarhaldið skal grundast á føroyska framleiðslu, ímeðan sambandsflokkarnir halda at einki ber til uttan við vælvild frá Danmark. Teir vilja grunda landshúsarhaldið á inntøku frá dønum, og teir brúka allan sín mátt at sáa mistreystið niður í fólk okkara.

Nú koyra sambandsflokkanir í felag ræðuherferðir um, at búskapurin er yvirupphitaður, men sjálvandi uttan at vísa á nøkur alternativ, - tað er sera lætt, men eisini sera ábyrgdarleyst, - men tað er teimum so líkt.

## Kjarnin í samfelagnum

**Rógvi Borðoy**
*valevni Fólkafloksins í Eysturoy*

Ásannast má, at familjan er staðið, har vit øll verða formað. Men hóast stóru uppgávuna fær heimið ikki altíð fyrstaplássið í einari familju, tí bæði foreldrini eru noydd at hava fulltíðarstarv fyri at kunna liva.

Eisini er lóggevingin so, at tað loysir seg ikki peningaliga at vera giftur, og tí velja mong fólk at liva saman ógift, og hetta vil Fólkaflokkurin arbeiða fyri í komandi valskeiði.

**Fólkaflokkurin vil:**
1. at hjún við einari inntøku fáa dupultan botnfrádrátt
2. at foreldur skula kunna velja, um børnini verða ansað heima ella á stovni
3. hækka barnafrádráttin
4. at gjald fyri ansing eigur at fylgja barninum heldur enn stovninum
5. at bygging av stovnum fer fram í tann mun ráðini eru til tað
6. virka fyri menning av barnsburðargrunni á privata arbeiðsmarknaðinum
7. virka fyri at partíðarstørv gerðast alsamt vanligari á arbeiðsmarknaðinum

Fólkaflokkurin arbeiðir eisini fyri at ansingarpolitikkurin kemur so nær at borgaranum sum gjørligt, og tí skula kommunurnar umsita og fíggja barnaansingarstovnunum í tann mun tað er gjørligt.

## MVG'ið skal burtur

**Olav Enomoto,**
*Valevni Sambandsflokksins í Norðurstreymoy*



Mvg rakar pensionistar, láginntøku og barnaríku familjurnar harðast. Tí skulu neyðsynjarvørur sum mjólk, breyð og medisin frítakast.

Mvg er nakað, sum fólk flest ilskast inn á, og rætt hava tey. Fólkaflokkurin av øllum flokkum var fortalari og innførari av hesum tvangsgjaldi. Nakrar vørur og tænastur eru frítiknar fyri mvg, og av teimum kunnu nevnast bøkur. Alt gott um tað, men tað eru fleiri vørur, ið eisini áttu at verið mvg-fríar.

**Børn og bíligari mjólk**
Tað er syndarligt at síggja og hoyra um, at foreldur heldur geva børnunum sodavatn og aðrar søtar drykkir ístaðin fyri mjólk, ið teimum tørvar í vakstrarárunum. Foreldur eiga ikki at kunna hava sum undanførslu, at mjólkin er ov dýr. Eg vil heldur vera við til at minka um prísin á mjólkini við at taka mvg'ið burtur.

**Eldri og sjúk**
Tey eldru og veiku, ið rakt eru av sjúku, hava medisin fyri neyðini, men nógv teirra hava ikki pening nokk til besta og dýrasta medisini, ið kann vera við til at lekja tey. Eg vil gera mítt til, at fólk ið hava medisin fyri neyðini, aftur fáa ráð til tess, við at vit avtaka mvg'ið á medisini.